LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Vágs Kommuna
Vágsvegur 30
900 Vágur

Tórshavn, tann 19. september 2012
J.Nr.:21/ 201200014 / 24
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Viðvíkjandi klagu frá A um innlit**

Í skrivi, dagfest, 15. apríl 2012 hevur A klagað um handfaringina hjá Vágs Kommunu av einari innlitsumbøn, sum varð send kommununi tann 9. januar 2012.

Av tí at klagarin hevur fingið innlit í umbidna mál tann 27. januar 2012 hjá Vágs Kommunu, havi eg avvíst hesa klaguna.

Málið hevur tó givið mær høvi at gera viðmerkingar til handfaring av innlitsmálum, herundir málsviðgerðartíðina hjá kommunini.

Sambært § 16, stk. 1, í Innlitslógini skal myndugleikin sum skjótast gera av, um innlit verður givið, og hvussu hetta verður gjørt. Um støða ikki er tikin til hetta innan 10 dagar frá tí, at umbønin er móttikin, skal myndugleikin sambært § 16, stk. 2, boða viðkomandi frá orsøkini til hetta, og nær ein avgerð er væntandi.

Í viðmerkingunum til danska lógaruppskotið, sum er fyrimyndin fyri okkara Innlitslóg, stendur soleiðis í Folketingstidende 1985/86, tillæg A, spalte 196:

> ”Udvalget har fremhævet, at en hurtig behandling og afgørelse af sager om aktindsigt er en væsentlig forudsætning for, at offentlighedsloven kan opfylde sine intentioner om, at pressen og andre nyhedsformidlende institutioner skal have mulighed for ved anvendelse af loven løbende at orientere befolkningen om aktuelle sager, der er under behandling i den offentlige forvaltning.
> Udvalget foreslår derfor, at der indsættes en ny bestemmelse, hvorefter den, der har fremsat begæring om aktindsigt, såfremt begæringen ikke er imødekommet eller afslået inden 10 dage efter, at den er modtaget af vedkommende myndighed, skal have underretning om grunden hertil samt om, hvornår en afgørelse kan forventes at foreligge.”

Í serligu viðmerkingunum til § 16 í donsku lógini stendur í Folketingstidende 1985/86, tillæg A, spalte 233 soleiðis:

> ”Efter bestemmelsen i *stk. 1* skal sager om aktindsigt afgøres ”snarest”. Denne ændring i forhold til formuleringen af den tilsvarende bestemmelse i den gældende offentlighedslovs § 8, stk. 2, tilsigter at fremhæve, at sager om aktindsigt skal behandles med særlig hurtighed. Også den gældende offentlighedslov bygger på en forudsætning herom, der bl.a. har afspejlet sig i folketingets ombudsmands praksis. Der kan derfor i det hele henvises til redegørelsen for gældende ret i betænkningen side 314 ff. Dette led i bestemmelsen må i

Traðagøtu 43 · Postrúm 2008 · FO-165 Argir · Tlf 358500 · Faks 358501 · lum@lum.fo · www.lum.fo

> øvrigt ses i sammenhæng med lovforslagets § 16, stk. 2.
> ...
> Bestemmelsen i *stk. 2*, der er ny, er begrundet i et ønske om at sikre, at behandlingstiden for begæringer om aktindsigt ikke uden rimelig anledning trækker ud. Der er ikke indsat en absolut frist for sagsbehandlingens varighed i aktindsigtssager, men bestemmelsen om, at den begærende skal have en begrundet underretning i tilfælde, hvor aktindsigt ikke kan imødekommes inden for 10 dage, samt oplysning om, hvornår en afgørelse kan forventes at foreligge, må i sig selv forventes at bidrage til, at behandlingen ikke unødigt trækker ud."

Lógin sigur greitt, at støða skal takast til eina innlitsumbøn skjótast gjørligt. Um ongar serligar forðingar eru, kann avgerðin tí ikki útsetast – heldur ikki í upp til 10 dagar.

Vágs Kommuna hevur fingið innlitsumbønina tann 9. januar 2012, men innliti verður ikki givið klagaranum fyrr enn 27. januar 2012, ella 18 dagar seinni. Í hesum tíðarskeiði fekk klagarin onga kunning frá Kommununi um, hví innlit ikki verður givið.

Tað framgongur av málinum, at klagarin vendi sær til Innlendismálaráðið um vantandi viðgerð í Vágs Kommunu av innlitsumbøn hansara. Innlendismálaráðið heitti við teldupost, dagfestur 24. januar 2012 á Vágs kommunu um at avgreiða innlitsumbønina beinanvegin. Innlendismálaráðið vísti í teldupostinum á, at ráðið í sama máli hevur greitt kommununi frá ásetingunum í innlitslógini. Harumframt varð í teldupostinum frá Innlendismálaráðnum víst á, at løgfrøðiliga ráðgevingin hjá Kommunusamskipan Føroya hevði svarað kommununi við teldupost, dagfestur 17. januar 2012. Innlendismálaráðið ger harumframt vart við, at um innlitsumbønin ikki var avgreidd beinanvegin fór Innlendismálaráðið at seta neyðug tiltøk í verk mótvegis kommununi.

Sambært málinum er einki sum bendir á, at talan er um eitt serliga fløkjasligt ella torført mál, og tí átti støða at verið tikin til innlitsumbønina um ikki beinanvegin, so í øllum førum fáar dagar seinni. At kommunan hevur søkt sær løgfrøðiliga vegleiðing um innlit, frítekur ikki kommununi fyri skyldur sínar sambært m.a. Innlitslógini, nevnliga at taka støðu til fyriliggjandi innlitsumbøn skjótast gjørligt.

Eg haldi tað vera alt annað enn nøktandi, at tað ganga 18 dagar frá tí, at innlitsumbønin verður sett fram, til Vágs Kommuna svarar henni.

Eg fari, vísandi til tað, sum er nevnt omanfyri, at geva Vágs Kommunu eina átalu fyri handfaringina av hesum máli.

Burtursæð frá omanfyristandandi, geri eg ikki meira við málið.

Avrit av hesum skrivi er sent klagaranum og verður í næstum almannakunngjørt á heimasíðu okkara.

Vinarliga

Sólja í Ólavsstovu
umboðsmaður